



*Yngsta dóttirin, Marta Sævarsdóttir, býr í Herlev við Keypmannahavn. Her avnymdað saman við mammuni, Emmu Hansen, ið er ættað av Nesi, sum Sævar Jóhannesson hevur verið giftur við í sløk 48 ár*



*Seinstu 45 árini hevur Sævar Jóhannesson, sum hevur føroyska konu, arbeitt við at skráseta og týða fingramerki*

- Útyvir, at eg hevði áhuga fyri at halda fram við hesum arbeiðinum, sjálvt um eg nú var vorðin pensjónistur, var tað soleiðis, at ongin hevði neyðuga førleikan at yvirtaka hesa uppgávuna. Aftan á 1997, tá starvsfelagi mín fór á pensjón, var eg tann einasti at gera hetta arbeiðið, sigur Sævar Jóhannesson.

Av somu orsøk hevur føroyskt gifti íslendingurin verið við til at uppklára eina rúgva av brotsverkum. Hann hevur ikki talið á tí, men talan er um fleiri hundrað. Mest innbrot, men til dømis eisini smuglara- og narkobrotsverk. Bara síðsta ár var Sævar Jóhannesson við til at uppklára 40 mál. Ella 40 pluss, sum hann sigur, tí tá eitt brotsverk er uppklárað, kann tað vera við til at uppklára okkurt annað mál eisini.

Tey seinnu árini hevur alt gingið fyri seg á teldu. Hetta fer fram á tann hátt, at eitt ávíst fingramerki verður skannað inn á telduna, og so finnur teldan 10 skrásett fingramerki fram, sum líkast tí nýggja.

- Síðani er tað upp til mín at finna útav, um nakað av hesum er tað rætta. Og hesum skal eg vera 100 prosent vísur í, tá ein brotsmaður verður útpeikaður, sigur Sævar Jóhannesson.

Tá talan er um stór brotsverk, sum til dømis dráp, eru tey tekniski prógvini oftani fingin til vega við at gera dna-kanningar á brotstaðnum, men leitað verður sjálvandi eisini eftir fingramerkjum, sum síðani koma inn og verða kannaði.

- Eg fari ikki út á brotstaðið, men fái fingramerkini inn, og kanni tey síðani.

Spurdur um hann nakratíð hevur verið úti fyri, at tey prógvini, sum hann hevur fingið til vega gjøgnum fingramerki, ikki hava hildið í rættinum, sigur Sævar Jóhannesson:

- Ongantíð. Prógvini hava altíð hildið í sambandi við rættarsakina. Fyri nøkrum døgum síðani var eg í rættinum og vitnaði, har tann ákærdi nokaði at hava verið á brotstaðnum, men tá fingramerki hansara vóru á staðnum, so var ongin bøn, og hann varð dømdur.

*So tað er ongantíð nakað at taka feil av?*

- Nei, tað er nevniliga soleiðis, at um eg ikki eri heilt sikkur í, at tað er viðkomandi, so kemur ivin honum til góðar, sigur Sævar Jóhannesson, sum er í Føroyum og ferðast minst einaferð um árið, og oftani meir enn tað.

Hann eigur nevniliga seks føroysk abbabørn, tí elsta dótturin, Elsebeth Hansen, er gift á Nesi. Maðurin hennara er Oleif Hansen.

Hini bæði børnini hjá Emmu og Sævar búgva í Íslandi og Danmark. Sonurin, Jóhannes Albert Sævarsson, er advokatur í Reykjavík, meðan dótturin, Marta Sævarsdóttir, er fólkaskúlalærari og býr í Herlev. Øll børnini tosa sera gott føroyskt, ið tey hava lært sum børn ígjøgnum tær mongu summarferiurnar hjá ommu og abba á Nesi.

Omman og abbin her í Føroyum, sum náddu at halda nakað so sjáldsamt sum jarnbrúdleyp – tað er 70 ár í hjúnarlag – áðrenn tey løgdu árarnar inn fyrrapartin av nítiárunum, vóru Elsebeth og Tummas Hansen; vanliga nevndur Tummas í Gerðinum.

Jóhannes og Marta eiga ávikavist trý og tvey børn hvør, so tilsamans eiga Sævar og Emma 11 barnabørn.